

# Statoil borar á Johan Sverdrup

**Jan Müller**

07.03.2014 - 16:50

Oljan.fo

Statoil, sum er fyristøðufelag á tveimum av teimum trimum loyvunum í teirri risastóru Johan Sverdrup-leiðini í Barentshavinum, hevur nú sett borin í havbotnin. Talan er um ein avmarkingarbrunn har norðuri á leiðini. Ætlanin er at bora smáar 2.000 metrar niður í undigrundina, og boringin er mett at taka 45 dagar.

Johan Sverdrup-leiðin er tað størsta fundið í norskum øki síðani miðskeiðis í áttatiárunum. Gongst sum ætlað, byrjar framleiðsla har í 2019, og metingarnar siga, at tað fer at bera til at framleiða millum 550.000 og 650.000 tunnur um dagin í 50 ár.

Statoil er sum nevnt fyristøðufelag á leiðini, sum nú verður borað. Felagið eigur 40

prosent av loyvinum. Hini feløgini í samtakinum har eru Petoro við 30 prosentum, Det norske oljuselskap við 20 prosentum og Lundin Norway við 10 prosentum